

*Nýggja og stórsligna konserthúsið, sum gøtumaðurin Ósbjørn Jacobsen hevur havt ein týðandi leiklut í at mynda og skapa, liggur út ímóti havinum. Íslendski staturin og Reykjavíkar býur hava tikið stig til at byggja konserthúsið*

# r konserthús rónur



*Forhøllin í nýggja konserthúsinum er líka stórsligin, sum húsið annars er*

Stór íslendsk og útlendsk feløg tóku seg saman í bólkar, og tá ið kappingin byrjaði vóru tað fýra ymiskir bólkar við hvør sínum íslendskum banka uppi í. Tey fóru í gongd, og spenningurin var stórur, tí heimskendir arkitektar vildu eisini verða við.

Eitt nú var bretski Norman Foster uppi í tí eina bólkinum, og franski Jean Nouvel var við í einum øðrum, men báðir snávaðu á vegnum. Norman Foster gav upp á hálvari leið, og ætlanin hjá Jean Nouvel var vald frá áðrenn endaligu avdúkingina.

## Heim at njóta sigurin

Tá ið vinnarin so var kosin mikudagin, var tað projektið hjá Portus Group, sum varð valt, og harvið vóru strikurnar og hugskotini hjá Ósbjørn Jacobsen og starvsfeløgunum staðfest sum tey bestu.

– Tað er stuttligt at vinna eina slíka kapping, tí tað hava verið heimskend nøvn innan arkitektur uppi í, men kanska høvdu vit tær bestu íslendsku kontaktirnar. Vit hava millum annað samstarvað nógv við íslendska listarmannin Ólafur Eliasson um fasaduna á húsinum, og íslendsku fyritøkurnar, sum eru við í bólkinum, eru sjálvandi ein avgerandi orsøk til, at vit vunnu kappingina, heldur Ósbjørn Jacobsen.

Á middegi hósdagin lendi hann aftur í Keypmannahavn. Ætlanin var at fara til arbeiðis beinanvegin, men hann broytti ætlan og valdi at taka frí hósdagin, tá ið hann eisini kundi halda sín 32 ára føðingardag.

– Hetta var ein góð føðingardagsgáva at fáa, so nú fari eg heim at slappa av og njóta sigurin, segði Ósbjørn, tá ið hann var á veg ígjøgnum flogvøllin í Kastrup.

## Íslendsk náttúra givið íblástur

Designið av íslendska tjóðarkonserthúsinum og rástevnudeplinum er gjørt við íblástri í stórslignu íslendsku náttúruni við gosfjøllum, goskeldum, stórum áum og stórfingnum fossum. Íslendska náttúran hevur endaleysar litir – frá skínandi reyðum til ísblátt – og sjógvurin hóttir stundum við brimi og aldum, og stundum er hann spegilsblankur og róligur.

– Vit hava grundað okkara tekningar á íslendsk eyðkenni, men vit hava gjørt tað á ein modernaðan hátt, sigur Ósbjørn Jacobsen.

Konserthúsið liggur á einum framúrskarandi plássi út ímóti havinum, har heita vatnið hittir kalda Atlantshavið. Bygningurin er sum ein svølgjandi alda ímóti teimum trimum høllunum á bakkanum.

Nýggja konserthús liggur í útjaðaranum av Reykjavík. Fasadan er eitt fjølbroytt ljósspæl. Innbúgvið vísir skiftið í árstíðunum við ymiskum litum og skapi og skal eisini geva ábendingar um lívð og virksemið í húsinum.

Íslendski listamaðurin Ólafur Eliasson hevur sett sítt fingramerkið á forhøllina og takið, og hann hevur eisini funnið sín íblástur í íslendsku nátturuni.